# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 29. oktober 2020 |
| Mál nr.: | 20/00634 |
| Málsviðgjørt: | PL |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**flyting uttan samtykki**

Við heimild í § 13, stk. 5 í løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin) verður ásett:

**§ 1.** Flyting av persóni sambært § 13, stk. 4, nr. 1 í løgtingslógini er at meta sum fyribils flyting.
*Stk. 2.* Tá persónur verður fluttur sambært § 13, stk. 4, nr. 1 í løgtingslógini, skal myndugleikin skrivliga boða honum og avvarðandi hansara frá, nær viðkomandi aftur kann flyta í upprunaliga bústaðin.

**§ 2.** Flyting av persóni sambært § 13, stk. 4, nr. 1 - 3 í løgtingslógini er at meta sum endalig flyting.

**§ 3.** Tá persónur verður fluttur sambært § 13, stk. 4 í løgtingslógini, hevur myndugleikin skyldu at tryggja, at flytingin fer fram á ein slíkan hátt, sum ávirkar persónin í so lítlan mun sum til ber.
*Stk. 2.* Í sambandi við flytingina skal myndugleikin taka fyrilit fyri heilsustøðuna hjá persóninum, undir hesum í hvønn mun flytingin eigur at verða framd yvir eitt longri tíðarskeið.

**§ 4.** Er talan um at flyta persón úr einum bútilboði hjá landinum til eitt kommunalt bútilboð ella øvugt skal greið avtala millum myndugleikarnar vera tøk, áðrenn tilmæli verður lagt fyri tvingsilsnevndina sambært § 13, stk. 4 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Umframt at myndugleikarnir skulu vera samdir um flytingina, skal avtalan sambært stk. 1 greitt lýsa, hvat slag av bútilboði, ið viðkomandi skal flyta í og nær og á hvønn hátt flytingin fer fram.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almannamálaráðið, 29. oktober 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen